Konseptbilurin Jaguar XX líkist mest einum upplyftum Jaguar S-Type stationcar

Jaguar fylgja SUV mótanum

So gott sum øll bilmerki hava í hesum døgum ein SUV (Sport Utility Vehicles) í síni skrá, og sjálvt Jaguar, ið eru best kendir fyri sínar luksus- og sportsbilar, arbeiða í loyndum við konseptbilinum XX, ið verður ein 4-hjólsdrivin SUV

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Off-road er vorðin ein mótasøk. So gott sum øll bilmerki hava ein SUV (Sport Utility Vehicles) í síni skrá, sjálvt sportsbilar sum t.d. Porsche, við Cayenne, og Maserati, ið hava sýnt fram konseptbilin Kubang.

Tann næsti nýggi SUV verður helst frá Jaguar, sum í løtuni arbeiða í loyndum við konseptbilinum XX. Bilurin verður nokk í stíl við Mercedes-Benz R - ein frítíðarbilur ið verður drivin av øllum fýra hjólunum.

Tað er Ford-konsernin sum eigur Jaguar, so væntandi verður talan um eitt 4x4 system frá Volvo ella Land Rover, sum eisini hoyra til Ford-konsernina. Ongar tekniskar upplýsingar eru komnar fram um bilin, men á spiómyndini líkist hann einum upplyftum Jaguar S-Type stationcar.

Peugeot 307 facelift

Nýggi Peugeot 307 líkist nógv tí størra Peugeot 407 framman við stórum kølaragittari í kúfangaranum. Tokulyktir framman er standardútgerð

Peugeot 307, sum kom á marknaðin í 2001, verður nú broyttur nakað við t.d. nýggjum designi framman og nýggjum baklyktum. Bilurin líkist nógv tí størra Peugeot 407 framman

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Tað hoyrdist einaferð, at tá Peugeot 307 fekk ein avloysara, skuldi tað vera ein nýggjur við navninum 308. Men tað verður í hvussu so er ikki enn, tí nú fær núverandi Peugeot 307 eina sokallaða facelift við t.d. nýggjum designi framman, nýggjum baklyktum. Onkur nýggjur motorur verður eisini á skránni, og sótfiltur verður standard í 2,0 litur dieselútgávuni.

Viðvíkjandi útgerð verða onkrar broytingar, t.d. verða tokulyktir framman standard á øllum modellunum og aircondition verður standard í SW- modellunum.

Peugeot 307 hevur annars staðið seg væl í hørðu kappingini í sokallaða Golf -klassanum, har kappingin er sera hørð.

Nýggjur VW Jetta í oktober

Í oktober 2005 kemur ein nýggjur VW Jetta á marknaðin, ið avloysir núverandi VW Bora. Bilurin sær út sum ein minni útgáva av VW Passat og verður eins og VW New Beetle gjørdur í Mexico

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

VW Jetta var upprunaliga sedan útgávan av Golfinum. Í Evropa bleiv navnið seinni broytt til VW Vento og síðan til VW Bora, men nú verður navnið so aftur Jetta. Í USA hevur bilurin øll árini havt navnið Jetta. VW bilar sum t.d. Passat, Jetta og Bora eru allir uppkallaðir eftir ymiskum vindum.

Bilurin verður gjørdur á eini Volkswagen-verksmiðju í Mexico. Á verksmiðjuni arbeiða 15.000 starvsfólk sum í fjør framleiddu 225.000 bilar, harav 70 prosent av framleiðsluni fór til útflutnings.

Í november 2004 byrjaði Wolkswagen í Mexico framleiðsluna av nýggja Jetta, og bilurin kom á amerikanska marknaðin í januar 2005.

Jetta sær meira út sum ein minni útgáva av nýggja VW Passat enn sum sedan útgávan av VW Golf. Bilurin er munandi størri enn Bora, sum hann avloysir, t.d. er hann 18 cm longri og viðførisrúmið er vaksið við 72 litrum til 527 litrar. Aksilfrástøðan er 6,5 cm

VW Jetta líkist nógv nýggja VW Passat. Bilurin er munandi størri enn VW Bora, sum hann avloysir

størri, og bilurin er rúmligari innan. Bilurin er á leið somu stødd sum Skoda Octavia, sum er í somu familju.

Frá Bilasøluni í Hoyvík verður sagt, at VW Jetta verður í Føroyum í oktober.